## Enskur landsliðsleikari handtikin

Joey Barton úr Manchester City er í dag handtikin, skuldsettur fyri harðskap móti einum hýruvognsførara í Liverpool fyrr í ár. Handtøkan kemur bert ein mánaða eftir, at hann varð dømdur 20.000 krónur í bót fyri at hava víst seg fyri áskoðarum, tá ið lið hansara hevði tapt fyri Portsmouth. 24 ára gamli enski landsliðsmiðvallarin er ikki bara ein ófriðarkroppur uttanfyri vøllin, men á vøllinum er hann eisini tiltikin fyri at vera harðligur. Beiggi Joey Barton situr inni fyri lívið, eftir at hann í fjør varð dømdur fyri at hava myrt ein myrkan mann við øks.

## Saviola heldur neyvan fram í Barca



Argentinski landsliðsáleyparin, Javier Saviola, segði í gjár, at hann væntar ikki at vera í Barcelona eftir summarsteðgin. Sáttmálin hjá honum við Barcelona gongur út í summar, og av tí at hann enn ikki hevur fingið bjóðað ein nýggjan sáttmála, væntar hann ikki, at framtíðin er í spanska stórfelagnum. – Eg vil helst vera verandi í Barcelona, men teir hava ikki vent sær til mín enn, og um hetta ikki broytist skjótt, so fari eg sjálvandi at finna mær eitt nýtt felag. Nógv bendir tó á, at Saviola ikki fær stórvegis trupulleikar at finna eitt nýtt felag. Feløg sum Sevilla, Valencia, Monac og Villarreal hava longu víst áhuga.

# Róðrarfelagið Knørrur gongur nýggja leið



*Róðrarfelagið Knørrur hevur gjørt samstarvsavtala við størsta danska róðrarfelagið, DSR. Avtalan ger, at DSR fær eitt gott samband við rógvarar hjá Knørri, tá ið hesir fara burtur í lestrar- ella arbeiðsørindum.*

**Róðrarfelagið Knørrur úr høvuðsstaðnum hevur tikið upp samstarv við størsta danska róðrarfelagið, DSR**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Føroyingar hava leingi átt góðar rógvarar, sum hava staðið seg væl uttanlands, og nakrir teirra eru komnir úr Róðrarfelagnum Knørri í Havn – teirra millum Katrin Olsen. Hetta hevur nú givið endurljóð í donskum feløgum, og samstarvsavtala er nú gjørd ímillum Róðrarfelagið Knørr og DSR, størsta róðrarfelagið í Danmark.

Fyri DSR merkir avtalan, at felagið fær gott samband við rógvarar hjá Róðrarfelagnum Knørri, tá ið hesir fara burtur í lestrar- ella arbeiðsørindum, og kann bjóða teimum venjing og umstøður á høgum stigi. Fyri Róðrarfelagið Knørr merkir nýggja átakið, at rógvarar felagsins kunnu fáa eina góða og trygga byrjan upp á róðrarlívið í útlondum, um teir ynskja tað, eins og felagið fær vitan og royndir at nýta í ítróttarbeiði sínum í Føroyum.

Samstarvið er longu farið at virka, tí um dagarnar er Jesper Krogh og undirvísir rógvarum og venjarum hjá Róðrarfelagnum Knørri. Jesper Krogh hevur í fleiri ár verið partur av danska landsliðnum í kapproðri.


**Ítróttarsosialurin**
**– vit eru har tað hendir**




# Tórshavn Open

**Tórshavn Open kapping hevur verið í Badmintonhøllini í Havn um vikuskiftið. Leygardagin var kappingin fyri U13, U15 og unglingar og vaksin og sunnudagin fyri U9 og U11**

**Úrslitini gjørdust:**

**U13**

Gentur:
nr.1 gjørdist Helena S.Lamhauge, HBF
nr.2 gjørdist Elsa Sørensen, HBF
nr.3 gjørdist Sunniva Berg, ÍF

Dreingir:
nr.1 gjørdist Arnold Kristiansen, ÍF
nr.2 gjørdist Pól Magnus Petersen, ´F
nr.3 gjørdist Julian Olsen, VÍF

**U15**

Gentur:
nr.1 gjørdist Guðrið Poulsen, VÍF
nr.2 gjørdist Birita Poulsen, VÍF
nr.3 gjørdist Súsanna Poulsen, VÍF

Dreingir:
nr.1 gjørdist Ári Ó. Ellingsgaard, ÍF
nr.2 gjørdist Ári J. Ellingsgaard, HBF
nr.3 gjørdist Andreas Poulsen, HBF

**Kvinnuunglingar:**
nr.1 gjørdist Fjóla Luid, HBF
nr.2 gjørdist Óluvá Bærentsen, ÍF
nr.3 gjørdist Hanna Elisa Arge, HBF

**Vaksin**

Kvinnur:
nr.1 gjørdist Guri Poulsen, HBF
nr.2 gjørdist Byrnild D. Carlsson, HBF

Menn:
nr.1 gjørdist Niclas Eysturoy, HBF
nr.2 gjørdist Rógvi Poulsen, HBF

Blandaður tvímansleikur:
nr.1 gjørdist Guri Poulsen / Niclas Eysturoy, HBF
nr.2 gjørdist Brynhild D. Carlsson / Flóvin S. Mikkelsen, HBF

**U9**

Gentur:
nr.1 gjørdist Kristina Eriksen, HBF
nr.2 gjørdist Brynja Rógadóttir, VÍF
nr.3 gjørdist Elsa P. Joensen, HBF

Dreingir:
nr.1 gjørdist Magnus Eysturoy, HBF
nr.2 gjørdist Boas Andreasen,
nr.3 gjørdist Sølvi Olsen á Skúr, HBF

**U11**

Gentur:
nr.1 gjørdist Svanna Poulsen, VÍF
nr.2 gjørdist Heidi Hansen, VÍF
nr.3 gjørdist Ása Egilstoft Nielsen, MBF

Dreingir:
nr.1 gjørdist Áki Egilsnes, VÍF
nr.2 gjørdist Janus Egilstoft Nielsen, MBF
nr.3 gjørdist Sjúður Olsen, VÍF